

Teldusíðan



Høvuðsmenuin í Wintune 95. Í fýrkantunum siggjast tekniskar upplýsingar um telduna, tey góðu ráðini forritið hevur aftan á kanningina, og aðrar upplýsingar til tey áhugaðu



Myndin vísir hvussu Wintune 95 strukturerar allar tær upplýsingar um telduna og stýriskipanina, sum verða savnaðar í ein lista, sum Windows 95 sjálvt nýtir

Vit lúra í Windows 95

Tað er ikki altíð eins lætt at stýra Windows 95. Forritið Wintune 95 hevur góð ráð og lættskiljandi tøkniligar frágreiðingar

TEKSTMASKINAN

Gjøgnmum tíðirnar eru ótalliga nógv leika eru pilkað sundur, kannað og - sjáldan sett saman aftur. Hóast holla vitan og fingrasnildi, eru tað tey fæstu, ið hava hug at pilka seg inn í kabinetti á einum PC'ara, og har spæla Georg Gearløs.

Men tað eru ráð fyri tí. Við forritinum Wintune 95 kanst tú koma langt inn í loynikrókarnar í maskinuni og næstan uttan vanda tuna maskinuna.

Test og góð ráð

Wintune 95 er eitt forrit, sum testar hareware'ið og stýriskipanina, hvussu hon er sett saman, kann ávísa villur og um okkurt manglar eins og - sum tað besta av øllum - kann forritið eisini geva góð ráð og skilligar frágreiðingar upp á alt bæði í telduni og í stýriskipanini.

Wintune byrjar við at gera eina nágreiniliga kanning av maskinuni. Allar upplýsingar um útgerðina verða savnaðar og ferðir verður málð.

Aftaná kannar forritið stýriskipanina alla sum hon er - her verður einki mált, men kannað verður um allar tær fleiri hundrað innstillingar í Windows 95 eru rættar í mun til hardware'ið og í mun til tað, sum Microsoft mælir til.

Tá kanningin er liðug, kemur forritið fram við tilmælum til broytingar, um okkurt skeivt er funnið.

Um onkur skeiv uppseting í Windows er funnin, sigur forritið frá, hvussu hetta kann rættast og hvønn týdning tað hevur.

Um okkurt av hardware'inum er galið - ein sløvur harðdiskur ella eitt videokort uttan accelerator - sum serliga er ein fløskuhálsur á maskinuni hjá tær, so sigur forritið tær eisini tað

Spidaran í botn

Ferð og tempo eru munurin millum ein góðan PC'ara og ein ringan. Krafti mátast fyrst og fremst við, hvussu skjótt teldan arbeiðir við instruktónum og data.

Wintune 95 ger eina nágreiniliga kanning av ferðini á prosessaranum, RAM, harðdiski og skermi. Tað sigur t. d., at cachen á prosessaranum næstan tíggjuduplar lesiferðina fyri tey fyrstu kilobyte'ini.

Tað er hóast tað ikki fullkomið. Eitt nú kann tað ikki siggja, um ein turboknøttur er sligin til ella frá, ella um tað eru sett ov nógv waistates til RAM'ið.

Eitt stórt leksikon

Nógv ráð og upplýsingar eru, sum gera Wintune 95 til eitt nyttugt amboð.

Har eru góð ráð og skilligar frágreiðngar til hvønn einasta part av maskinuni og stýriskipanini.

Tær teknisku upplýsingarnar, sum kunnu lesast í einum hierakiskum træ á sama hátt sum í hardware-uppsetingarforritinum hjá Windows. Hvør smálutur er her stutt lýstur.

Frá tí einstaka smálutinum kanst tú kobla teg á ein stóran hjálpifíl, sum nærmast fungerar sum eitt leksikon um PC'arar.

Tú kanst sjálvandi eisini lesa allan hjálpifílin ella leita í honum.

Wintune 95 er eitt av teimum forritum, sum kann veita tær flestu upplýsingar um teldu tína. Tal, kodur og versiónsnummur, sum vanliga eru ómøguligt at fáa fatur á, koma av sær sjálvlum aftan á gjølligu kanningina av harware'inum.

Tað er sjálvandi ikki so ofta, at tú t. d. hevur brúk fyri at kenna versiónsnummarið á tínum BIOS, men um so er, er hinvegin sera týdningarmikið - eitt nú ti tú vilt vita um ein vánalig skermmynd skyldast, at nýggja grafikkortið ikki er kompatibult við BIOS'in.

Og so er tað ókeypis

Wintune 95 fæst frá amerikanska Windows Magazine.

Tað er ókeypis og fæst via modem á NNS'inum Danish Keyboard á tlf 33255600, ella á Interneti á adressuni: http://www.winmag.com/software.

Teknisk frágreiðing...

BIOS

BIOS stár for Basic Input Output System. Det er et program, indbygget i computeren, som starter styresystemet og kontrollere om kommunikationen mellem CPU'en og maskinens indre og ydre enheder virker.

Cachen

Cachens formål er at øge overførelseshastigheden af data fra den langsomme RAM og harddisk til den hurtige CPU, computerens processor. Den består af to små og hurtige RAM-lagre, hvori CPU'en midlertidigt gemmer de data, som den henter fra de store hukommelseslagre. Det ene depot er indbygget i processoren og er normalt på 12 kilobyte. Det andet lager rummer typisk 256 RAM og sidder på bundkortet. Data, som ligger i cachen, er hurtige at få fat i, hvis de skal bruges igen, - ikke kun p.g.a. cachens arbejdstempo, men også fordi CPU'en leder i cach-depoterne, før den søger videre i de andre lagre. Når et depot er fyldt, fjerner cachen de data, som den har brugt mindst.

Wait states

Waitstate kan bedst oversættes med hastighedstilpasning eller blot pauser. CPU'en er normalt flere gange hurtigere end RAM'en, dvs. at CPU'en faktisk kan spørge om langt mere end RAM'en har tid til at svare på. For at kommunikationen kan fungere mellem dem, indsætter systemet waitstates, så enhederne tilpasses hinanden. Sammen mekanisme fungere mellem CPU'en og maskinens øvrige enheder,

BBS

BBS er en forkortelse af Bulletin Board System. Bulletin Board betyder opslagstavle. Et BBS er en elektronisk opslagstavle, som man kan kontakte via et modem, og hvor alt kan hentes.

Telduskemt

Teknirøðir á Interneti kennst hjá mongum, sum fiskur í luftini. Tær *skulu* bara lesast í bløðunum ella í onkrum albumi. Ikki tí, í løtuni finnast knappar 200 røðir á netinum, og fleiri eru á veg. Netið er ófør reklama hjá teknarum. Nakrir av teim frægastu nýtarunum av netinum eru jú journalistar og redaktørar, sum kanska leita eftir nýggjum røðum. Fyri teir ikki so kendu teknararnar, er netið tí ein góður møguleiki at fáa reklamu uttan at gjalda fyri hana.

Nakrir teknarar vilja lata tekningarnar til nýtslu - har vinningur ikki er fyri eyga. Á henda hátt ber til - heilt ókeypis - at prýða sítt felagsblað við óføra skemtingarsomum tekningum.

Ein lesandi í USA hevur savnað saman links til allar tær teknirøðirnar, sum finnast á nettinum, á síni heimasíðu.

Adressan er: http://student-web.tulane.edu/~jseifert/comics/comics2.htlm.



Copyright © 1996 United Feature Syndicate, Inc
Redistribution in whole or in part prohibited

Handil á netinum

Forlagið Carlsen er eisini farið einum virtuellum handli við teim kendastu teknirøðunum.

Á adressuni http://www.foirlagetcarlsen.dk siggjast tær nýggjastu, finna gamlar og lesa um røðir og høvundarnar aftan fyri tær.